# Fundur í Hvalbiar sóknar kommunu hin 10. dec. 2010

Møtt vóru: Otto West, Trygvi Midjord, Martin í Nesi, Herdis Jensen, Rúni Thomsen og Niels J. Thomsen. Niels Olaf Eyvindsson kom kl. 17.45.

Fundurin varð settur kl. 16.15.

1. **Umsókn um stuðul til fløguútgávu frá Hanus G. Johansen.**
   Samtykt varð ikki at veita stuðul til hetta endamál.

2. **Umsókn um stuðul til tiltakið "Í menniskjum góður tokki".**
   Samtykt varð at stuðla hesum við kr. 5.000,-.

3. **Umsókn frá Hvalbiar skúla um 4 farteldur aftrat verandi.**
   Samtykt varð at játta skúlanum 4 teldur aftrat.

4. **Skriv frá parti av Vega- og Havnanevndini.**
   Partur av Vega-og Havnanevndini heitir á kommununa um at byrja at gera nýggju omankoyringina og jørðarbeiðið øki 1 og 2. Eisini mæla tey til, at løgfrøðingur kannar málið um sáttmálan viðv. matr. nr. 390c. Samtykt varð at fáa løgfrøðing at kanna øll viðurskiftini á havnaøkinum viðv. neystum v.m.

5. **Skriv viðv. matr. nr. 39a.**
   Skriv sum framhald frá fundi 10. sept og 4. nov. 2010 um møguligt keyp av jørð matr. nr. 39a í Hvalba. Samtykt varð at bíða til skriv kemur aftur frá teimum.

6. **Skriv frá Niels Olaf Eyvindsson um ráðgeva til kommununa.**
   Samtykt varð at brúka HMP Consult sum ráðgevar hjá kommununi.

7. **Skriv frá Niels Olaf Eyvindsson um stuðulspolitikk.**
   Í uppskotinum er orðaður ein fastur stuðulspolitikkur til feløg, einstaklingar og tiltøk. Samtykt varð at halda fram sum áður, t.v.s. at umsóknir koma inn og verða viðgjørdar á fyrstkomandi bygdarráðsfundi.

8. **Skriv frá Martin í Nesi viðv. túni aftaná asfaltering.**
   Skriv í sambandi við at vegur er vorðin so ójavnur aftaná at asfalterað varð seinast. Samtykt varð, at málið verður loyst skjótast møguligt.

**9. Skriv frá Martin í Nesi viðv. Gamla skúla.**

Martin mælir til at nýta Gamla skúla til eitt kolasavn, møguliga saman við einum bygdarsavni. Samtykt varð at taka málið uppaftur, tá skúlin er liðugur uttan og annars at hann verður brúkt-ur til fornminni og savn um áhugi er fyri hesum.

**10. Keyp av arbeiðsbili – Otto West.**

Samtykt varð at keypa arbeiðsbil til arbeiðsmenninar hjá kommununi, um hesin er í nøktandi standi. Eisini varð samtykt at keypa saltara.

**11. Onnur viðgerð av eykajáttan fyri 2010.**

Í mun til seinastu viðgerð er eykajáttanin áljóðandi kr. 1.329.000,-. Eykajáttanin varð einmælt samtykt.

Uppskot um fundir fyri komandi ár varð samtykt.

**12. Upplýsing um mál beind í nevnd síðani síðsta fund.**

**13. Upplýsing um málsviðgerð síðani síðsta fund.**

Kunnað varð um ymisk mál.

Fundarbókin lisin og skrivað undir.

Fundurin lokin kl. 18.30.